# Fimleikalið 1928



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her er eitt fimleikalið í Realskúlanum í 1928.

**Aftara rað (deingirnir) f.v.:** Svend Skarðhamar, Óli Ellingsgaard (Eiði), ókendur, Kári Evensen, Børge Poulsen, Petur Joensen (Háberg), Theodor við Keldu, Ludvig Mohr (Luddi), Erling Skarðhamar, Niclas Andreasen, John Mortensen og Jákup Jensen (á Dul)

**Fremra rað (genturnar) f.v.:** Esta í Funningsstovu, Sanna Dahl Niclasen, Gunnhildur Evensen, ókend, Mia Trónd Hansen (Jensen), Ebba Simonsen (Vang), Nanna Skála og Jona Jacobsen.

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja ella hevur hug at ogna sær hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 257).

*Myndaeigari: Fornminnissavnið*

## Takk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg á 80 ára føðingardegnum tann 1. november.

**Marna N. Joensen**
**Eiði**



Familju, vinum og kenningum bæði innan- og uttanlands verða ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Marna og Jákup Joensen**
**Eiði**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá

**Edith av Fløtum**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.
Takk til tykkara, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum. Somuleiðis takka vit øllum, sum fylgdu henni til gravar og tykkum, ið mintust hana við at lata minnisgávu til Kristniboðsambandið.
At enda ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

*Tí at liva er mær Kristus, og deyðin er vinningur.*
Filip. 1.21.

*Vegna tey avvarðandi*
**Óla Hendrik**
**Hans, Eimy, Maud og Dorrit**

## Takk

Eg takki hjartaliga øllum tykkum, sum vóru við til at gera 80-ára føðingardag mín so ógloymandi.

Somuleiðis ynski eg tykkum øllum eini góð jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

**Heilsan**
**Leif Müller, Porkeri**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara kæri sonur og beiggi

**Jákup Absalon Vatnhamar**
Argir

doyði og varð jarðaður.
Tøkk til Hera Tróndheim og Bergur Debes Joensen, prest, fyri góð og troystarrík orð.
Ein serstøk tøkk til tykkum øll, sum vóru um hann.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur. Eisini tøkk til kirkjutænarar, berarar, sangarar og øll tykkum, sum hjálptu so væl til við jarðarferðini og ervinum.
Eisini vilja vit takka tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jensia Vatnhamar**

## Takk

Vit vilja senda eina hjartans tøkk til øll, sum vóru við til at gera 60 og 70 ára føðingardagin so góðan og hugnaligan.
Túsund takk til til øll, sum hjálptu so væl til.
Takk fyri talur, sangir og heilsanir.

Við ynskjum um eini góð og hugnalig jól og eitt av Harranum vælsignað nýttár.

**Bestu heilsanir**
**Anna Sofía og Heini**